# Skuldsettur fyri drápsroynd

**25 ára gamli maðurin, sum mikumorgunin skeyt eftir trimum løgreglufólkum í Magnus Heinasonargøtu í Havn, er nú skuldsettur fyri drápsroynd. Maðurin er fyribils varðhaldsfongslaður í fýra vikur**

LØGREGLA
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Kanningararbeiði eftir skotbardagan í Magnus Heinasonargøtu fór av álvara í gongd hósdagin. Í hesum sambandi er ein serfrøðingur frá donsku ríkisløgregluni komin til Føroya*

Drápsroynd móti løgreglufólki. Soleiðis ljóðar skuldsetingin móti 25 ára gamla manninum, sum mikumorgunum, við 20 metra frástøðu, skeyt við eini høglbyrsu móti løgreglufólki. Foreldrini hjá tí 25 ára gamla manninum boðsendu løgregluni, tí maðurin ætlaði at gera av við seg sjálvan við eini høglbyrsu. Men eftir at løgreglufólkini høvdu tosað við hann eina løtu, tók maðurin byrsuna og skeyt eitt skot eftir teimum. Sambært skuldsetingini royndi hann at drepa tvey av løgreglufólkunum.

Í grundlógaravhoyringini seinnapartin mikudagin varð maðurin skuldsettur eftir grein 237 í revsilógini. Har stendur at »den, som dræber en anden, straffes for manddrab med fængsel fra 5 år indtil på livstid«. Men av tí at maðurin ikki drap nakran mikumorgunin, skotið raktið ein metur við síðuna av tí eina løgreglufólkinum, so er grein 21 í revsilógini skoytt upp í skuldsetingina. Hon sigur, at tá atgerðin ikki verður fullførd, er hon at rokna sum roynd.

Í øðrum lagi, tvs. um ikki verður mett at grundarlag er fyri skuldsetingini um drápsroynd, er maðurin skuldsettur eftir grein 119 í revsilógini. Eftir hesi grein er maðurin skuldsettur fyri at hava hótt og framt harðskap móti løgreglufólki, sum vóru til arbeiðis. Í báðum føri er talan um álvarsligar skuldsetingar, sum kunnu geva fleiri ára fongsul.

Maðurin noktar seg sekan í skuldsetingini um at hann skal hava roynt at dripið tvey løgreglufólk. Hann sigur seg ikki minnast at hava skotið eftir teimum.

Dómarin gjørdi av at maðurin skal varðhaldsfongslast í fýra vikur, meðan kanningararbeiðið fer fram. Hann skal møta aftur í rættinum 8.oktober.

### Stórt kanningararbeiði

Kanningararbeiðið eftir hendingina í Magnus Heinasonargøtu mikumorgunin byrjaði av álvara hósmorgunin. Ein serfrøðingur frá kriminalteknisku deild hjá donsku ríkisløgregluni er komin til Føroya. Hann skal kanna løgreglubilin, sum varð raktur av skotunum frá høglbyrsuni, og eisini skal hendingin endurgerast, rekonstruerast, niður í smálutir, so ein neyv mynd fæst av, hvat fór fram, frá tí at løgreglan fekk boðini kl.06.09 til 25 ára gamli maðurin varð handtikin ein góðan hálvan tíma seinni.

Løgreglan hevur somuleiðis avhoyrt vitni til hendingina. Bergleif Brimvík, leiðari á Kriminaldeildini, sigur, at møguliga skulu fleiri vitni avhoyrast, og kanska skal onkur avhoyrast av nýggjum.

Høvuðspersónurin, tann 25 ára gamli maðurin, er enn ikki avhoyrdur av løgregluni. Bergleif Brimvík sigur, at avhoyringin í fyrsta lagi verður fríggjadagin. Í fyrstu atløgu hevur løgreglan valt at savna seg um tær teknisku kanningarnar, umframt at avhoyra vitni.

Í grundlógaravhoyringini mikudagin varð maðurin varðhaldsfongslaður í fýra vikur, og Bergleif Brimvík væntar, at fýra vikur er nóg long tíð hjá løgregluni at gera sítt kanningararbeiði liðugt.

# Øll hittini fara at ljóma

**Tað verður ein konsert av teimum heilt stóru, tá Boney M leygarkvøldið fer at spæla í Fuglafirði. Discobólkurin hevur framleitt hitt omaná hitt, og allir hesir kendu sangir verða at hoyra leygarkvøldið**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Føroyingar hava altíð tikið væl undir við Boney M. Tann lætti, svingandi og melodiøsi discotónleikurin hjá teimum hevur fangað føroyska oyrað, og tað munnu vera fáir bólkar, sum hava so nógv hitt í Føroyum, sum Boney M eigur.

Kendasti sangurin hjá teimum á okkara leiðum er helst »By the Rivers of Babylon«, sum eisini hevur uppiborið at verið so nógv spældur, sum hann hevur verið gjøgnum árini í Føroyum. Men ein rúgva av øðrum sangum bjóða seg eisini fram. Rasputin, Ma Baker, Daddy Cool og so víðari. Tað er næstan eingin endi á teimum sangunum, sum kunnu fanga eina breiða áhoyrarafjøld.

Alt hetta ber til at leggja oyra og eyga til í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið 14. september. Brakið í Fuglafirði verður ikki minni av, at ein av teimum tónleikarunum, sum hevur klárað at levera hitt aftaná hitt á føroyskum, eisini fer at spæla hetta kvøldið. Terji Rasmussen møtir upp við sínum tónleikarum og sínum sangum, sum røkka frá Eros, Eg flýggi til tónleikin og til Eg eri eitt nummar og aðrar.

Tað verða tí hópin av kendum og væl dámdum sangum á skránni, tá ein tann mest spennandi konsertin her í landinum í langa tíð verður í Fuglafirði leygarkvøldið. Her er ikki talan um háfloygdan og avbjóðandi tónleik. Hetta er framúrskarandi discotónleikur, sum øll verða tikin við av. Stutt og greitt.

Forsøla av atgongumerkjum er á Statoil-støðunum í Klaksvík, Leirvík, Saltangará, Kollafirði, Skálafirði og Havn og hjá Haraldsen í Fuglafirði. Atgongumerkini kosta 225 krónur.

Bussar úr Havn (Steinatún), av Toftum og av Strondum koyra klokkan 22.30 og heim aftur eftir konsertina. Bílegg pláss við bussinum úr Havn á telefon 21 64 64, pláss er fyri 130 fólkum. Ternan siglur av Klaksvík klokkan 22.15. Busssamband er úr Leirvík og til Fuglafjarðar og heim aftur eftir konsertina, tá Alfa Pilot siglur av Leirvík.

# Coaching og vinnulívið

TK STOVAN
*Skeiðsdepilin í Marknagili*

Flest øll munnu kenna orðið coach frá eitt nú ítróttini, t.d. football coach ella basketball coach. Orðið merkir ein venjari, kennari ella lærari.

Leikluturin hjá einum coach er at motivera ítróttarfólki at gera sítt besta, at nýta allar sínar ressourcir, at tryggja at ítróttarfólkið tekur ábyrgd av sínum gerðum og avgerðum og roynir sjálvstøðugt at loysa trupulleikar.

Men coaching er eisini eitt hugtak, ið hevur vunnið størri og størri frama í vinnulívinum, tí coaching kann nýtast sum leiðsluamboð. Í framtíðini skal leiðarin evna at motivera starvsfólkini at taka ábyrgd fyri uppgávunum og eggja starvsfólkini til sjálvi at finna loysnir. Til hetta kann coaching nýtast.

Tú hevur nú møguleikan at kunna teg um hvat coaching er. At fáa innlit í hví, hvat, hvussu og nær - við øðrum orðum at fáa innlit í leiðsluamboðið coaching. TK Stovan skipar í samstarvi við Skeiðsdepilin í Marknagili í døgunum 20. og 21. september 2002 fyri skeiði um coaching.

Skeiðleiðari er Bo Echwald. Hann hevur gjørt vart við seg innan sigliítróttina. Eitt nú hevur hann eitt heimsmeistaraheiti og tvey danmarksmeistaraheitir innan hesa ítróttargrein. Eisini hevur Bo Echwald royndir frá vinnulívinum, har hann m.a. hevur starvast sum marknaðarleiðari hjá Nike Danmark og Yonex. Bo Echwald hevur í 11 ár arbeitt sum sjálvstøðugur ráðgevi, m.a. við leiðslumenning, coaching, teambuilding og samskifti. Millum fyritøkurnar, hann hevur arbeitt saman við teljast Unibank/Nordea. Hjá hesi fyritøku hevur Bo Echwald havt um hendi leiðsluvenjing.

Skeiðið hevur verið fyrireikað í meiri enn eitt ár, men av tí at Bo Echwald er sera umbiðin, hevur ikki borið til at fáa hann henda vegin fyrr enn nú. Skeiðið er ætlað leiðarum, millumleiðarum og annars teimum, ið hava áhuga fyri evninum.

Til ber at tekna seg hjá: Skeiðsdeplinum í Marknagili, e-post mb@hsh.fo ella tlfnr. 318813 ella hjá TK Stovuni, e-post: tk@tk.fo, tlf.nr. 317366 ella á heimasíðuni hjá TK Stovuni www.tk.fo.

Tilmeldingarfreistin er mánadagin 16. septembur 2002. Skeiðslýsing og skrá eru á heimasíðuni hjá TK Stovuni.



# Agip á beinari kós

**Italska oljufelagið Agip og Føroya Kolvetni fara at bora á landgrunninum í juni næsta ár**

OLJULEITING
*Jan Müller*



*Martin Heinesen, leiðari av Jarðfrøðissavninum tekur ímóti Ron Lansdell, sum nú gevst í Føroyum og fer til Kazakstan. Aftanfyri Graham Steward, nevndarformaður í Føroya Kolvetni*

*Mynd Jens K. Vang*

Gongst sum ætlað fara Agip og Føroya Kolvetni at bora á landgrunninum í juni næsta ár. Hetta upplýsir stjórin hjá Agip fyri Føroyaøkið, Aldo Napolitano. Hann váttar, at teir í løtuni hava biðið um tilboð uppá ein boripall. Týsdagin vitjaðu umboð fyri Agip og Føroya Kolvetni Oljumálaráðið, har tey greiddu frá arbeiðinum at gera klárt til komandi boring. Aldo Napolitano sigur, at teir eru »on the track« tvs. teir eru á kósini og at tað restar lítið í at kunna gera av júst hvar boristaðið verður. Sosialurin skilur, at Agip hevur gjørt sær stóran ómak við arbeiðsprogramminum undan síni fyrstu boring á landgrunninum, og at hetta boðar frá, at felagið, sum telist millum heimsins størstu oljufeløg, tekur sína uppgávu í Føroyum í størsta álvara. Ætlanin var at bora í fjør, men heldur óvæntaðu turru brunnarnir hjá Statoil og BP og eins óvæntaða fundinum hjá Hess í djúpri løgum gjørdu, at Agip metti tað rætt at tulka seismikkin av nýggjum og at fáa til vega nýggjan seismikk. Tað skilst, at nýggi seismikkurin hevur beint Agip á eina áhugaverda kós.

Aldo Napolitano sigur við Sosialin, at teir framvegis hava vónir um at gera fund á landgrunninum, hóast tveir turrar brunnar í fjør. Uppá fyrispurning um teir ætla sær at undir eina boring uppá 200 til 250 mill. kr. nærum einsamallir sigur hann, at Føroya Kolvetni er við og hevur møguleika at brúka sína optión, sum merkir, at felagið kann fara frá 7% til 21% í loyvinum. Sum er hevur Agip 93%, og tað verður mett at vera ein stórur váði at átaka sær. – Eru onnur feløg, sum vilja koma uppí lisensin (farma inn) og vit kunnu blíva samdir um treytirnar, so eru dyrnar opnar sigur Aldo Napolitano, sum heldur ikki dylur fyri, at teir sjálvir eisini hyggja seg íkring eftir partnarum. Men sum sagt hevur Føroya Kolvetni enn møguleika til at økja sín lut fram til boringina í juni.

### Ron Lansdell gevst

Í sambandi við arbeiðsvitjanina hjá Agip nýtti leiðarin av kanningarbólkinum seinastu mongu árini, Ron Lansdell, høvi til at takka fyri seg. Hann skal royna nýggjar avbjóðingar og fer til Kazakstan at arbeiða fyri Agip. Ron Lansdell er millum tey útlendsku oljufeløgini, sum hevur verið longst í Føroyum. Á samkomu mikudagin takkaði hann føroyskum oljumyndugleikum fyri góða samstarvið og ynskti føroyingum og oljuvinnuni góða eydnu.



*Leitistjórin hjá Agip Aldo Napolitano hittir Herálv Joensen, deildarstjóra í Oljumálaráðnum*

*Mynd Jens K. Vang*

# ChevronTexaco raðfestir Atlantsmótið høgt

**Risastóra oljufelagið ChevronTexaco metir góðar møguleikar at gera olju og gassfund á Atlantsmótinum, sum føroyski landgrunnurin er partur av**

OIJULEITING
*Jan Müller*

Skulu vit ganga eftir metingunum og raðfestingini hjá einum av teimum stóru oljufeløgunum í heiminum, tí júst samanlagda ChevronTexaco, so kann Atlantsmótið og harvið eisini føroyski landgrunnurin goyma nógva olju og gass. Andy Clitharoe, leitistjóri hjá ChevronTexaco fyri Atlantsmótið sigur við Sosialin, at tey meta Atlantsmótið sum eitt av teirra høvuðsleitiøkjum í altjóða høpi. Við Atlantsmótið skilst tá alt økið frá Írlandi til Føroyar/Hetland og víðari til Norðurnorra. Hesin stóri áhugin hjá ChevronTexaco fyri økinum gjørdi eisini, at felagið fekk tillutað nøkur av teimum mest áhugaverdu loyvunum í 19. útbjóðing í bretskum øki tætt upp at føroyska markinum. Felagið søkti eisini um loyvi á føroyska landgrunninum men mátti lúta í tí hørðu kappingini um loyvini. Andy Clitharoe sigur, at teir hava ikki mist áhugan fyri Føroyaøkinum av teirri orsøk. Hann dylur ikki fyri, at teir bíða spentir eftir 2. útbjóðing á landgrunninum og skilst, at felagið fer at vísa hesi útbjóðing stóran áhuga serliga um komandi boringar í økinum geva úrslit. Hann setir annars stórar vónir til boringina í Camboprospektinum nakað norðan fyri verandi oljukeldurnar Foinaven og Schiehallion. Amerada Hess er operatørur/fyristøðufelag og er ChevronTexaco partur av tí boringini. Hesin brunnurin skal ætlandi borast í vetur. Felagið ætlar so eisini at fara undir enn eina boring í næsta ár. Hon liggur tætt uppat Agiplisensinum á landgrunninum.

Andy Clitharoe, sum fleiri ferðir hevur vitjað í Føroyum í sambandi við teirra royndir at fáa fótin fastan her – eitt skifti høvdu teir skrivstovu í Havn – sigur, at teir meta góðar møguleikar vera fyri at finna olju og gass í øllum hesum stóra økinum, sum er landnyrðingsparturin av Atlantshavinum. Her er góður møguleiki fyri nýggjum prospektiviteti sum hann málber seg á fakmálinum. Hann leggur dent á, at jarðfrøðin kennir ikki mørk eins og samfeløg gera tað, og tí heldur hann, at brunnar, sum verða boraðir í bretskum øki tætt við markið hava eins stóran týdning og áhuga fyri føroyska landgrunnin og øvugt.

Kanningarstjórin hjá ChevronTexaco heldur tað annars vera brúk fyri einum veruligum fundi á Atlantsmótinum, tí tað eru nú nógv ár síðani, at Foinaven (1991) og Schiehallion (1993) vórðu funnin. Uttan mun til hvørju megin markið fundið verður gjørt so heldur Andy Clitharoe, at tað av álvara kann seta ljóskastaran á alt økið og harvið fáa gongd á leitingina. Økt leiting kann hava fleiri fund við sær.

Hann dylur heldur ikki fyri, at tey hjá CevronTexaco ikki minst hava stóran áhuga fyri økjunum longur norðuri, har tey eisini hava fingið leitiloyvi á bretska landgrunninum.

– Vit síggja heilt stórar struktarar har, og tað skuldi verið lovandi. Tørvur er á at gera 3D seismikk í økinum leggur hann aftrat.